

*Listamaðurin Edward Fuglø setti ftukt- og grønmetisborðið vakurt og prýðiligt upp. Hann sigst hava blaðað í gomlum bókum, fyri at vita hvussu teir gomlu rómverjarnir borðreiddu slíkt.*

# Heilsudagur í Klaksvík

**Í sambandi við Torradagarnar í Klaksvík, var heilsukafé í Skálanum í dag**

TORRADAGAR
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Benjamin Rasmussen*

Leygardagin var Skálin í Klaksvík at kalla ov lítil, tí so nógvur áhugi var fyri heilsutiltakinum. Landsstýrismaðurin í Heilsumálum, Hans Pauli Strøm, setti stevnuna, sum var skipað sum ein kafe. Hann hevði nógv rósandi orð at bera Torratiltakinum sum heild. Hann helt fyri, at Klaksvík gongur undan á nógvum økjum – eisini innan heilsu. Her vísti hann til serliga roykiátakið, sum skúlarnar standa fyri, Treysti og so heilsukafeina sum eitt av mongu skilagóðu tiltøkunum í Torraskránni.

Hann var so fegin, at hann skeyt upp, at býurin væl kundi verða róptur ein Heilsu-bý.

- Hesum kunnu vit bert taka undir við og lofta, og gera enn meir við, siga tey frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi og fyrireikararnir av Torradøgunum, sum annað árið rað hava havt heilsukafeina á skránni í sambandi við Torradagarnar.

Dávur Winther, mentanarleiðari í Klaksvíkar Kommunu, sigur, at røðin at sleppa til tær ymiski kanningarnar: blóðtýst, blóðsukur, kondi, vekt, lungaorku og mikið meira tók ongan enda frá byrjan til enda.

- Men tíðin tóktist ikki long, tí hópin av sunnum og góðum grønmeti og frukt var at fáa, og prátið gekk so lystiliga, sigur hann. Og leggur afturat, at mitt í meldrinum, stóð „sunnheitsappostulin" Korosh og mól eina blanding úr frukt, sum hann kallaði: Heilsugranat.

- Jú, heilsukafein var ein ordilig succes og verður uttan iva á breddanum til næstu Torraskránna.



*Blóðroynd verður tikin av Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í almenna- og heilsumálum*







Gunnar Streymoy
Íløguráðgevi
Tlf. 516227
gst@skjernbank.dk

Skjern Bank bjóðar íløgumøguleikar, ið hóska júst til tín tørv.

Fá eitt prát við Gunnar Streymoy og hoyr nærri um tínar møguleikar.

www.skjernbank.dk
SKJERN BANK

**Solar Føroyar**

Starvsfólk søkist

**Starvið umfatar sølu av el-lutum. Vit vænta at tú hevur royndir innan sølu og /ella tænastu, dentur verður lagdur á, at tú dugir væl at samskifta og er fyrikomandi.**

**Vilt tú hava meira at vita um starvið Vinarliga kom inn á gólvi ella send ein teldupost til.**

solar FØROYAR

Solar FØROYAR
Brekkutún 2
Hoyvík
Tel 35 79 33
Fax 31 78 90
finn@solar.fo
www.solar.fo



**Nýtt!**
**Elektroniskt kotulás**
Ver tryggur við einum elektroniskum lási frá okkum.
**einans 3.995,-**
Íroknað íseting av lásasmiðum okkara





**Lásini fáast eisini til fingraavtrykk!**

**Heilt nýggj og øðrvísi lás!**

Høg góðska og tryggleiki uttan nýtslu av lyklum. 10 ymiskar kotur, vel tølini (1-10) sjálv/-ur. Passar til vanligar lásakassar. Kann setast í inn- og úthurðar. Tolir veður og vind. Kann latast upp bæði uttanífrá og innanífrá við kotu. Kann eisini fáast við alarmskipan.
Vælegnað til barnafamiljur, almennar stovnar og fyritøkur. 2 ára garanti

Valdemar Lützen Byggibúð
Skálatrøð 14 Tel 30 10 20 · vlb@vlb.fo